# Rakstrargjald fyri ph.d verkætlanir

Staðfest av rektaranum 30/1-2014

Tann lesandi verður innskrivaður á Fróðskaparsetri Føroya sambært treytum ásettar í *kunngerð nr. 18 frá 3 mars 2011 um ph.d-nám á Fróðskaparsetri Føroya*.

Kostnaður fyri innskriving, hýsing og vegleiðing av ph.d-lesandi á Fróðskaparsetri Føroya verður árliga ásettur eftir fylgjandi leisti:

a. Tann lesandi skal rinda 40.000 kr. um árið fyri at verða innskrivaður á Fróðskaparsetir Føroya.

b. Tann lesandi fær vegleiðing frá ábyrgdarpersóni, ið annaðhvørt er lektari ella professari við Fróðskaparsetur Føroya. Ávegismeting av verkætlanini verður framd hvørt hálvár. Tíðarnýtsla til vegleiðing og evaluering er sett at vera 100 tímar um árið. Tímataksturin verður ásettur sambært galdandi sáttmála við Akademikarafelag Føroya fyri vegleiðing.

c. Fyri arbeiðspláss við internet, atgongd til rannsóknarstovu og umsiting er kostnaðurin settur til 3.000 kr./mðr. – hesin kostnaðurin verður javnan endurskoðaður. Um serligar umstøður gera seg galdandi, t.d. við víðkari nýtslu av serliga dýrari útgerð, kann serstakt rakstrargjald ásetast fyri hendan partin.

d. Í sambandi við verju av ph.d.-ritgerðini verður avroknað í mun til faktiska kostnaðin fyri fyrireiking av verjuni og gjald til andmælingar fyri døming, ferðing, gisting o.a. Samlaði kostnaðurin fyri ph.d.-ritgerðarverju plagar at liggja um 60.000 kr., og skal hædd takast fyri hesum í fíggjarætlanini.

Fróðskaparsetur Føroya